# Læra at selja smyrsl og klæðir



*Sóley Magnussen smyr her Silviu Højgaard, sum er í praktikk í Vero Moda*

*Mynd: Oda Ellingsgaard*

PRAKTIKK
*Oda Ellingsgaard*

Í mótahandlinum Vero Moda, sum liggur inni í SMS, stendur ein nýggjur praktikantur, hon eitur Silvia Maria Højgaard. Hon er úr Runavík, og gongur í 10 flokki í Runavíkar Kommunu Skúla.

Hon byrjaði sum praktikantur í Vero Moda mánadagin 19 februar, og skal vera har í 2 vikur.

Hon valgdi Vero Moda tí at henni dámar sera væl klæðir, og vildi prøva arbeiðið.

Hiðartil hevur henni dáma sera væl. Arbeiðsfólkini hava tikið sera væl ímóti henni, og hon hevur longu lært nógv um handilin.

Hon skal møta hvønn morgun kl 9.00 og fær fríð kl 17.30.

Hon byrjar dagin við at dustsúgva allan handilin, og síðani skal hon pussa speglini í umklæðingarrúminum, restina av degnum gongur hon rundt í handlinum og ruddar upp í klæðunum, og tekur fyri frá kundum.

Sjálvt um henni dámar hetta arbeiði sera væl, so er hetta ikki eitt arbeið sum hon hevði tíma haft í longri tíð.

– Hetta arbeiðisplássi krevur ikki tað stóra av einum persóni, og her alt ov líti av avbjóðingum. Men hetta er naka sum eg bara vildi prøva, og tað hevur verði ordiliga skeg", sigur hon.

Tá ið Silvia er ligu við 10 flokk, ætlar hon sær inn á Kamsdal í student. Hon roknar við at taka sær eitt ár fríð aftaná student, kanska fer hon ein Interrail túr við einari venindu.

Aftaná eitt ár frí ætlar hon sær niður at lesa til djóralækna.

Hon elskar djór, og orkar ikki fyri at síggja djór pínast og vil tí verða før fyri at hjálpa teimun. Hon heldur eisini, at tað ljóðar sera spennandi.

Inni í The Body Shop, stendur eisini ein praktikantur; Sóley Magnussen úr Lamba. Hon gongur eisini í Runavíkar skúla.

Hon skal eisini verða í praktik í tvær vikur. Hon hevur nú verið í eina viku, og henni dámar sera væl.

Hon bleiv væl móttikin fyrsta dagin hon kom, og tær hava verði sera blíðar við hana.

Hon valdi at fara í praktik í The Body Shop, tí at hon vildi læra meira um vørurnar sum Body Shop hevur. Og hon ætlar sær at verða skurðlækni, og tá skal ein duga at verða reinligur, og tað lærur hon eisini um í The Body Shop.

Síðani hon byrjaði hevur hon vaska nógv, tí at í The Body Shop leggja tey stóran dent á at alt skal verða reint og ruddeligt. Hon hevur eisini lært at smyrja sær sjálvum og øðrum, hetta heldur hon verða sera skeg.

– Mær dámar sera væl at vera her, men hetta er ikki ordiliga tað sum eg vil. Men eg haldi at tað gott at ein kan sleppa út í praktik og royna ymisk arbeiði. Men hetta hevur ikki broytt mína meining, eg vil enn verða skurðlækni"

Tað er sera gott at fólkaskúla næmingar kunnu sleppa út í praktik, tí at tað hjálpir teimun sum ikki vita hvat tey skullu, at seta sær mál, og finna útav hvat tey vilja við sínum lívið.

# Michael Learns To Rock í Føroyum

KONSERT
*Oda Ellingsgaard'*

Tann 9 mars verður konsert við Michael Learns To Rock í høllini á hálsi. Atgongumerkir kosta 220 kr, og kunnu fáast í kunningar stovuni í Havn. Billettir verða sendar um alt landið.

Michael Learns To Rock er uttan iva ein av teimun bestu donsku bólkunum nakrantíð, og eru teir eisini heimskendir. Tí verður tað sikkurt sera spennandi at fáa vitjan av teimun.

Michael Learns To Rock hevur fyrr verið í Føroyum, og tá dámdi teimun sera væl her, og teir gleða seg tí til at koma aftur til hetta flotta landið, siga teir.

Bólkurin varð stovanaður um várið í 1988, og longu sama árið vunnu teir tvær tónleikakappingar.

Árið eftir fingu teir eina plátukontrakt við danska plátufelagið Medley Records, og útgóvu teirra fyrstu single "The Actor".

Ì 1991 komu teir so út við teirra fyrstu fløgu, sum æt "Michael Lears To Rock". Í tveir mánar seldu teir meira enn 30.000 eintøk av henni.

Í 1993 kom so teirra næsta fløga út, "Colours", sum seldi yvir 1,1 millión eintøk og bleiv tann best seljandi danska fløgan nakrantíð.

Ì 1995 kom "Played On Pepper" út, sum eisini bleiv ein kanónsukses. Fløgan seldi uml. 100.000 eintøk í eitt hálvt ár, og lesarnir av teimun báðum donsku tónleikabløðunum Mix og Vi Unge valgdu Michael Learns To Rock, til ársins danska bólk 1995, og "That's Why" til ársins donsku single.

Ì 1996 útgóvu teir "Paint My Love - Greatest Hits", og hon seldi meira enn 2,5 milliónur eintøk .

Ì 1999 góvu teir ymisk Greatest Hits og Remix fløgur út (umkring) í verðini.

Michael Learns To Rock halda fram við at spæla saman, og teir klára tað gott, tí at við teirra 5. fløgu " Blue Night", sum varð útgivin í november í fjør seldu teir fyrsta dagin t.d 42.000 eintøk bara í Indonesiu.



*Michael Learns To Rock eru sera kendir í Asiu og nú royna teir at koma á europeiska marknaðin*



# Pengar til gamlan grevstur

**Norðoya Fornminnasavn hevur sett pengar av til at gera grevsturin niðri í Toftum á Borðoyarvík lidnan. Arbeiðið byrjaði í 1969**

FORNMINNI
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Fríggjadagin hevði Norðoya Fornminnafelag aðalfund, og á hesum fundi vórðu nýggj fólk vald í nevndina.

Jógvan Lützen og Heðin Jóhannesen avloysa Símun Petur Sólheyg og Símun Dahl.

Umframt teir eru Hanus Poulsen, Bjarni Ziska Dahl og Mildrid Petersen í nevndini. Nevndin hevur ikki skipað seg enn, men Hanus Poulsen var formaður.

Norðoya Forminnafelag eigur og rekur Norðoya Fornminnasavn, har tveir savnsvørðar starvast.

### Grava á Borðoyavík

Í rakstrarætlanini fyri 2001 eru pengar settir av til at gera grevsturin niðri í Toftum á Borðoyarvík lidnan. Har eru toftir frá miðøldini at finna.

Arbeiðið byrjaði í 1969 og helt í fyrstu syftu fram til 1972. Síðani var einki gjørt fyrr enn í 1989 og 1990, og nú ætlar Norðoya Fornminnasavn, at grevsturin skal gerast liðugur í ár. Tað er Føroya Fornminnissavn, sum stendur fyri arbeiðnum, men Norðoya Fornminnasavn er sinnað at verða við í arbeiðnum fyri at fáa tað liðugt.



*Báturin Nólsoyar Páll fekk í fjør nýggjan teym, so hann aftur liggur trygt innast á vágni í Klaksvík. Norðoya Fornminnasavn umsitur og rekur bátin.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Ætlaðu at tyrva

Í fjør fekk Norðoya Fornminnasavn annars at vita frá Føroya Fornminnissavni, at ætlanin var at tyrva útyvir toftirnar niðri í Toftum, og harvið enda rannsóknirnar har.

Hetta skuldi gerast, tí so long tíð var liðin, síðani toftirnar vóru rannsakaðar, og eisini tí at økið mátti latast eigarunum aftur.

Norðoya Fornminnasavn mótmælti, at útgrevsturin varð tyrvdur, áðrenn øll rannsókn var liðug.

Í samrøðum víðari við Norðoya Fornminnasavn, hevur Norðoya Fornminnasavn fingið at vita, at tyrvingin møguliga verður slept, og at rannsóknin helst verður uppafturtikin og gjørd endaliga liðug í ár.

### Nólsoyar Páll

Norðoya Fornminnasavn setti seg í fjør í samband við Føroya Fornminnissavn og Klaksvíkar kommunu fyri at kanna, um møguleiki var at loysa bátin Nólsoyar Páll frá savninum á ein ella annan hátt.

Bæði Føroya Fornminnissavn og Klaksvíkar kommuna ynsktu, at Norðoya Fornminnasavn framhaldandi hevði bátin undir sær, og hesir stovnar vilja hjálpa til, um báturin gerst ov tung byrða fyri savnið.

Í fjør varð nýggjur teymur gjørdur til Nólsoyar Páll, so hann aftur liggur trygt, og motorurin hevur eisini verið gjøgnumgingin og er í góðum standi.

## Norðoya Kunningarstova gerast sjónligari

**Ferðavinnan í Norðoyggjum hevur sett nýggjan leiðara, og í tí sambandinum verður almenn móttøka hósdagin**



*Hósdagin hevur Ferðavinnan í Norðoyggjum almenna móttøku í sambandi við, at Christian Olsen tekur við sum leiðari á Kunningarstovuni í Klaksvík*

FERÐAVINNA
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Fyrsta dagin í mars tekur Christian Olsen við starvinum sum leiðari á Norðoya Kunningarstovu, og hendan dagin verður almenn móttøka á Kunningarstovuni í Klaksvík.

Bygnaðurin fyri Kunningarstovuna verður samstundis broyttur nakað, og arbeiðsuppgávurnar verða meiri fjølbroyttar.

Almenna móttøkan verður hósdagin frá klokkan 16.00 til 18.00 í hølunum hjá Norðoya Kunningarstovu í býráðshúsunum.

### Sjónlig

Seinastu dagarnar hevur Kunningarstovan verið afturlatin, meðan onkrar broytingar hava verið gjørdar í hølunum

– Nevndin hevur longu sett út í kortið fleiri ynski um, hvussu Kunningarstovan skal koma at virka í framtíðini, og vit vóna, at norðoyingar koma at taka væl undir við arbeiðnum hjá Kunningarstovuni, sigur Finn Johannesen, formaður í nevndini fyri ferðavinnuna í Norðoyggjum.

Nevndin ætlar, at Norðoya Kunningarstova skal gerast ein sjónligur partur av handilslívinum, ferðavinnuni, vunnulívinum og mentanini í Norðoyggjum.

# Teir bora á Reynsbakka

**Tað hevur gingið so mikið væl við vegagerðini hjá J&K Petersen, at vegurin til tunnilsmunnan í Vágum varð latin NCC ein mánað fyri tíðarfreistina**

TUNNILSGERÐ
*Edvard Joensen á Reynsbakka:*

Fyrsta skotið fyri undirstjóvartunnilinum undir Vestmannasundi Vágamegin, verður skotið týsdagin 27. februar 2001 klokkan 14.30. Borað varð fyri skotinum mánadagin.

Kavi er, og glerpípurnar hanga síðar niður úr hamrinum, sum gjørdur er við inntakið. Tað er kortini væl koyrandi eftir arbeiðsvegnum suður av Fútakletti. Lastbilarnir hjá Byggifelagnum J&K Petersen ferðast aftur og fram við tilfari til vegin. Ein gravimaskina stendur í Marknaánni og leggur oman yvir stálrørið, sum gera skal brúnna um ánna. Og longur suðuri er ein onnur maskina í ferð við at slætta tilfarið, lastbilarnir leggja eftir seg.

Suðuri móti inntakinum stutt norðan fyri Kálvadalsá eru menn í ferð við at smíða. Teir gera skúrar av samansettum bingjum. Sum skilst, skal hetta líkasum vera høvuðsstøð hjá NCC, nú farið verður at bora.

Ein bláur jeepur kemur norður eftir vegnum. Tað er bossurin hjá J&K, sum hevur verið og hugt at, hvussu stendur til har suðuri við endan.

– Jú, tað gongur væl, letur hann at. Vit skuldu lata vegin til NCC tann 5. mars, men lótu hann longu tann 7. februar, sigur John Petersen. Sostatt kunnu teir skjóta væl fyrr, enn væntað.

Og teir eru við at gera klárt til fyrsta skotið, sum skjótast skal týsdagin 27. februar.

Ein stór maskina við trimum borum stendur og borar inn í bergið. Fyrsta tekinið til, at nú verður av álvara farið undir boringina hesumegin. Og gongur eftir ætlan, fara teir at koma saman undir Sundinum í hesum árinum. Metingarnar siga, at tað verður um mánaðarskiftið november/ december.

Tað rekur suður við landinum. Æðurnar liggja og andøva út fyri. Tær tykjast líkasum hava vant seg við larmin. Tær munnu vera vanar við eitt sindur av hvørjum her fram við landinum suður frá Oyrargjógv.

Tað tjúknar norðuri í Sundinum. Enn eitt kavaæl er á veg, so best er at fáa tikið eina mynd, áðrenn ov tjúkt verður, og so bara sleppa sær norður aftur á vegin og upp um hálsin.

Í morgin verður neyvan so rúmligt her suðuri. Ivaleyst verða tá fleiri, sum eru boðin at koma framvið at síggja, tá fyrsta skotið verður latið av fyri tunnilsboringini úr Vágum undir Vestmannasund.



